# Nógvir nýggir BMW



*BMW X4, sum kemur á marknaðin um eini tvey ár, verður ein rættuliga spennandi bilur*

**BMW koma við nógvum ymiskum nýggjheitum komandi árini sum t.d. BMW X6, sum kemur á marknaðin síðst í apríl, og X4 sum eftir ætlan kemur í 2010**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein av spennandi nýggjheitunum hjá BMW er X6, ið er ein sonevndur SAV (Sports Activity Coupé), ein blandingur millum SUV og coupé. Hesin kemur afturat núverandi X-familjuni hjá BMW, X3 og X5.

X6 verður m.a. at fáa við 4,4 litra V8-bensinmotori við dupultari turbo, beinleiðis High Precision innspræning við 407 hk og botntrekki upp á 600 Nm. Eisini verða 6 syl. motorar á skránni. X6 hevur xDrive 4x4 skipan og Dynamic Performance Control, sum tryggjar bilinum stabilitet og drívmegi undir øllum koyriumstøðum.

BMW X6 kemur á amerikanska marknaðin í apríl og á evropeiska marknaðin síðst í mai 2008. Ein annar spennandi BMW sum arbeitt verður við er X4, sum kemur á marknaðin um eini tvey ár.






*BMW X6 er ein sonevndur SAC (Sports Activity Coupé), ein blandingur millum SUV og coupé*

# Bilasølur stuðla EB/Streymi



*Fýra bilar til EB/Streym, trýggir Hyundai Sonata og ein Hyundai Getz*


*Bilarnir vóru lætnir seinasta hósdag á bilasøluni Norðbil við Oyggjarvegin, f.v.: Frits Dam Jacobsen frá Norðbil, Sorin Anghel, ein av profilunum hjá EB/Streymi, Shaila Dam Jacobsen frá Norðbil, Sigfríður Clementsen, venjari hjá EB/Streymi, Esmar Olsen frá EB/Streymi og Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil. Jens Petur Jensen frá Nordcar vantar á myndini*

Bilasølurnar Nordcar og Norðbil hava sponsorað fótbóltfelagið EB/Streym við fýra nýggjum Hyundai bilum, trimum Hyundai Sonata og einum Hyundai Getz. Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil sigur, at teir eru væl nøgdir við sponsoravtaluna við EB/Streym, sum er eitt av bestu fótbóltsliðunum í landinum.